

www.oljan.fo

**Jan Müller** 27 - 09 - 2011

# Rockall er partur av Skotlandi

Skotar gera nú eisini krav upp á Rockall, og landsins umhvørvismálaráðharri sigur bart út, at tann farskotni kletturin er vestasta stað í Skotlandi. Richard Lockhead byggir orð síni á kanningar, sum nøkur vísindafólk hjá skotsku havrannsóknarstovuni og umhvørvismyndugleikunum hava gjørt í summar. Út frá teimum er niðurstøðan hjá ráðharranum, at Rockall og Helen's Reef eru teir báðir hægstu topparnir á Rockall-undirgrundarstøðinum, sum náttúrliga hoyrir til Skotland. Richard Lockhead sigur við Press Association, at nú fara skotar at gera eitt nágreiniligt kort av havbotninum kring Rockall, og at hetta kortið verður ein partur av grundarlagnum fyri skotska kravinum um ræðisrætt til Rockall-økið. Tilfarið skal latast landgrunnanevndini hjá ST í seinasta lagi í 2014. Danmark hevur Føroya vegna latið ST drúgvar grundgevingar, sum eftir føroyskari og danskari áskoðan vísa, at Rockall-landgrunsstøðið er náttúrligt framhald av tí føroyska. Nú hava so Føroyar, Bretland, Ísland, Írland og skjótt eisini Skotland sagt seg hava krav til ræðisrætt yvir Rockall-økinum, sum er góðar 600.000 ferkilometrar og røkkur meiri enn 800 fjórðingar suður um Føroyar. Flestu serfrøðingar halda, at olja og gass eru undir tí umstrídda havbotninum. Onkrar boringar eru gjørdar í økinum sunnan fyri Føroyar og vestan fyri Hebridurnar, sum tó ikki hava givið nakað úrslit. Mynd Skotar síggja møguliga oljukeldur úti í havsbrúnni vestan fyri Skotland